90 ára minni

Hósdagin vóru 90 ár liðin, síðani Petur Mohr Dam — stovnari og formaður Føroya Javnaðarfloks í mong ár — varð føddur.

Hann var fólkaskúlalærari og virkaði sum lærari í Suðri. Hann var ibirtarin av Føroya Javnaðarflokki og formaður floksins til sín deyðadag. Hann var stríðsmaðurin mikli og brann fyri teirra hugsjón, sum hann alt sítt lív stríddist heilhjartaður fyri.

Virksemið, sum kveiktist við Javnaðarflokkinum, fekk stóra ávirkan og størsta týdning fyri føroyska samfelagið bæði við Peturi Mohr Dam sum formanni og síðani.

Føroya Javnaðarflokkur varð fyrstu ferð umboðaður á Føroya løgtingi í januar 1928. Tá fekk flokkurin valdar tveir limir, Mourentius við Stein fyri Suðurstreymoyar valdømi og Petur Mohr Dam fyri Suðuroyar norðara valdømi. Hetta var eisini fyrstu ferð, Havnaðarflokkurin stillaði upp til løgtingsval.

Petur Mohr Dam gjørdist virkin í politiska lívinum alt sítt lív. Tað var hann, sum ibirti flestu av floksins tiltøkum og uppskotum heilt fram til deyðadag sín, og hann og J. Fr. Øregaard vóru samráðingarmenn um Føroya framtíðar støðu í ríkisfelagsskapinum. Javnaðarflokkurin hevði longu í 1943 sett fram uppskot um nýggja stýrisskipan fyri Føroyar, tí tað var ikki hugsandi, at vit aftan á kriggið var av, fóru aftur til gomlu amtsstøðuna. Samráðingarnar aftan á kriggið fórdu til, at vit í 1948 fingu stýrisskipan Føroya, heimastýrið.

Petur Mohr Dam var hin heitasti talsmaðurin fyri einari nýggjari stýrisskipan fyri Føroyar.

Í 1958 vann Javnaðarflokkurin 8 umboð á løgting, og Javnaðarflokkurin skipaði nýtt landsstýri.

Í januar 1959 gjørdist Petur Mohr Dam leiðari av nýggja landsstýrinum, hann sat sum løgmaður heta til 1963 og síðani aftur frá 1967 til sín deyðadag í 1968.

Petur Mohr Dam sat á løgtingi frá 1928 og var í mongum førum leiðari av tingnevndum og samráðingarnevndum, umframt at hann var umboð Javnaðarfloksins í Fólkatinginum, fyrstu ferð í 1948 til 1957, og frá 1964 til hann segði starvið frá sær í 1967, tá hann aftur varð løgmaður.

Petur Mohr Dam var politikari burturav, hann halgaði alt sítt lív til politiskt virksemi, var við í lokala politiska arbeiðnum á heimstaði sínum, Froðbiar sókn, hann var alla sína tíð framtaksmaðurin, slóðbrótarin og ibirtarin.

Tær samgongur og tey landsstýri, sum P. M. Dam var leiðari av, royndust Føroym hollar.

Petur Mohr Dam sýndi eisini ágrýtni at hevja tjóð okkara úteftir — tað var avreksverk hansara, at vit fingu limaskapin í Norðurlandaráðnum — og tað var mál hansara, at vit skuldu vinna fullan limaskap í Norðurlandaráðnum.

Ikki eru vit komin á mál enn í hesum stríð, men P. M. Dam setti skjøtil á, og hann vann. Fekk fulla undirtøku á Føroya Løgtingi og frá grannum okkara, ið allir ásannaðu rættleikan í tí, sum P. M. Dam bar fram á fyrsta sinni í ráðsfundi í Norðurlandaráðnum í Reykjavík, um at Føroyar áttu at fáa limaskap í Norðurlanda Ráðnum óskerdan. Iðin talsmaður var hann fyri hesum máli. Tá hann legði frá sær med alla, vóru tingingar um limaskapin komnar væl áleiðis.

Tey veiku og illa stíllaðu stóðu hjarta P. M. Dams nær, og her sum á øðrum økjum spardi hann seg ikki. Tá tær sosialu lógirnar skuldu førast ájavnt donsku, var tað mangur, sum helt, at vinnulív okkfara enn var ov lítið útbygt til at tað kundi bera ein so stóran vvirbvgning.

Men her var P. M. Dam kompromileysur. Hann, sum annars var samráðingarmaður sum fáur, var ikki til at vika.

Tá Petur Mohr Dam doyði, skrivaði Hans Jacob Jacobsen, Heðin Brú, m. a. hesi minningarorð: »P. M. Dam var ein sterkur maður. Ikki bert tí hann magnaði at halda upp á sítt, hóast mótstøðan var alt so sterk, men eisini av tí, at hann tað mesta av ævi sini var sjukur maður, so tað var ikki annarhvør, ið hevði orkað at borið hetta aftur at tí, sum arbeiðið fórdi við sær. Tað var honum egið, at hann aldri virdi sjúku sína, nevndi hana ikki, men arbeiddi áfram líka til tann dag, deyðin tók amboðini úr hondunum á honum.

Og kortini — so løgid kann mansins lagna vera — var hann ein vinsælur og mildur maður, sum treivst best í heimlívi sínum og millum vínir í frið og forlíkheit«.

j.l.

P/F North Atlantic Plast
PLASTRØRVIRKIÐ

Vit framleiða og selja vatnleiðingar og kloakrør

Kloak frá ø 40 mm til ø 500 mm.
Vatnleiðingar frá ø 25 mm til ø 500 mm í trýstklassa TN6 — TN10.

Septictangar og reinsibrunnar ø 200 — 250 — 315 mm, um ynskist gera vit reinsibrunnar eftir máti.
Vit hava allar tilhoyrandi rørdeildir á goymslu, eisini framleiða vit tilfar til alihyljar.

Vit geva fegnir tilboð.

Heil- og smásøla

P/F North Atlantic Plast
Plastrørvirkið
á Heygnum Mikla
Tlf. 1 2151

Lýsið í **sosialinum**

L F Ú

Søkir eftir fylgjandi starvsfólki:

Kunningarskrivara (10 tímar um vikuna)
Bókhaldara (2 tímar um vikuna)
Útbúgvingarráðgeva (15 tímar um vikuna)

Øll størvini eru at seta pr. 1. september 1988.

Kunningarskrivari:
Kunningarskrivarin skal virka sum skrivari hjá stjórnini í LFÚ og á øðrum fundum hjá LFÚ.
Skrivarin skal taka sær av innanhýsis sambandinum millum stjórn, arbeiðsbólkar og limafeløg.
Skrivarin skal seta í verk avgerðir tiknar í LFÚ.
Skrivarin hevur fasta skrivstovutíð nakrar dagar um vikuna kl. 16 til 18. Restin av arbeiðstíðini verður lødg í samráð við stjórnina. Roknast má við nakað av skiftandi arbeiðstíð uttanfyri vanliga arbeiðstíð.

Bókhaldari:
Bókhaldarin skal taka sær av bókhaldi felagsins, ið millumannað umfatar: LFÚ, LFÚ-ráðgevingin og blað felagsins »Miðskiftan«.
Arbeiðstíðin kann leggjast eftir ynski bókhaldarans (í samráð við stjórnina).
Telda við bókhaldsskipan er til taks.

Útbúgvingarráðgevi:
Ráðgevingin skal leiðbeina fólki, ið søkir sær vitan um útbúgvingarviðurskifti í Føroyum og uttanlands. Hesi viðurskifti umfata millum annað vanliga útbúgvingarvegleiðing, vegleiðing um bústaðarviðurskifti og studnings-, sosial- og skattaviðurskifti.
Ein partur av arbeiðinum verður uppbygging av einum føroyskum útbúgvingarsavni.
Ráðgevingin hevur fasta skrivstovutíð hvønn gerandisdag kl. 16 til 18. Restin av arbeiðstíðini kann leggjast eftir ynski ráðgevans (í samráð við stjórnina).

Lønarviðurskifti:
Løn verður latin eftir avtalu.

Onnur viðurskifti:
Fyri øll størvini er møguleiki fyri at víðka arbeiðstíðina.

Viðvíkjandi umsóknini:
Sami persónur kann søkja fleiri av størvunum.

Umsóknir verða at senda til:

LFÚ Forkvinnan,
Dr. Jakobsensgøta 16
100 Tórshavn

Í umsóknini skal standa hvat starv verður søkt, og hvørja møguliga útbúgving ella royndir umsøkjarin hevur.

Umsóknarfreistin er 30. august 1988. Fyrivarni verður tikið fyri endaligum játtanum.